Royal hárfríðkan · Coca-Cola · ATLANTIC AIRWAYS · Carlsberg · Kallkyn · Events



## Bíbliusøgur bannast?

Børn eiga ikki at verða undirvíst í kristni í fólkaskúlanum, heldur Jón Joensen, sum hevur gjørt ein Facebook-bólk við navninum »Kristni úr fólkaskúlanum«.

Kjak verður millum Jón Joensen og Una Næs, prest, um kristindóminum og bíbliusøgurnar í fólkaskúlanum.

## Tú kanst gera títt besta hvønn dag

Hon er ein av kendastu sjónvarpskvinnunum í Danmark. Hon hevur gjørt sendingar til millióna stórar hyggjarafjøldir, og nú ráðgevur hon fólki um, hvussu tey kunnu avrika sítt besta hvønn. Line Baun Danielsen hevur fleiri ferðir verið vald til besta kvinnuliga sjónvarpsvert í Danmark, og nú hevur hon skrivað nýggja bók um at verða mamma – men ikki heimsins besta mamma. Line Baun Danielsen verður gestur í Hvonn Live hesaferð.



KATRINA PETERSEN



## Nýggja røddin

Hon hevur tikið útbúgving á tónleikakonservatorium, hon hevur spælt nógv live, men hon hevur leingi savnað sær dirvi at geva tónleik út. Og nú er hon lopin út í tað við nýggjari útgávu, sum er væl móttikin. Katrina Petersen spælir live og sigur søguna um seg sum tónleikara og menniskjað.

hvonn ★★★★★ LIVE

leygarkvøldið kl. 20-22

...har alt kann henda!

RÁS 2 ...títt radio